KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 28.01.2016 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Varalimir: Jan Gardar møtti fyri Eyðstein Ó. Poulsen, Erling Petersen møtti fyri Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

| **Málsyvirlit** | | | |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 1/16 | 15/01217-3 | Býráðslimur burturstaddur (jan. 2016) - Eyðstein Ó. Poulsen | |
| 2/16 | 12/00546-52 | Møgulig kommunusamanlegging - Húsa og Klaksvíkar kommunur | |
| 3/16 | 15/01202-3 | Víðkan av leigumáli í KÍ-hølini - á Skúlatrød | |

## 1/16
## 15/01217 Býráðslimur burturstaddur (jan. 2016) - Eyðstein Ó. Poulsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 28.01.2016 | 1/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Eyðstein Ó. Poulsen, býráðslimur, hevur umvegis teldupost boðað borgarstjóranum frá, at hann verður burturstaddur til býráðsfundin 28. jan. 2016 og tí ynskir, at fyrsti varalimur floksins fær boð at møta. Sambært fundarútskrift frá Valnevndini frá 14. nov. 2012 er fyrsti varalimur Fólkafloksins Erling Petersen. Men av tí at Erling Petersen longu hevur sæti í býráðnum, tí annar býráðslimur á sama lista er í farloyvi, er neyðugt at kalla næst valda tiltakslim inn. Næst valdi tiltakslimur er Óli M. Lassen, men hann hevur eisini boðað frá, at honum berst frá at møta. Triðvaldi á listanum er Jan Gardar, og verður hann tí at møta vegna Eyðstein Ó. Poulsen til býráðsfundin 28. jan. 2016.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin (KSL), grein 18, stk. 2:
*Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
KSL, grein 18, stk. 3:

*Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til varalimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til lata Jan Gardar taka sæti í býráðnum á fundinum 28. jan. 2016.

**Býráðsins samtykt 28-01-2016**
Tilmælið samtykt, og Jan Gardar tók sæti fyri Eyðstein Ó. Poulsen

## 2/16
## 12/00546 Møgulig kommunusamanlegging - Húsa og Klaksvíkar kommunur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.01.2016 | 5/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.01.2016 | 2/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sum øllum kunnungt, hava verið samráðingar millum Klaksvíkar og Húsa kommunur um samanlegging. Fleiri fundir hava verið hildnir, og hevur Klaksvíkar kommuna verið umboðað av Jógvan Skorheim, borgarstjóra, Steinbjørn Jacobsen, varaborgarstjóra, Tummas Eliasen, kommunustjóra, og øðrum eftir tørvi.

Fyri Húsa kommunu hava umboðini verið Magni Garðalíð, borgarstjóri, Sólarn Isaksen, varaborgarstjóri og Dora Joensen, býráðslimur.

Umframt samráðingarnar millum partarnar, varð – eftir ynski frá Húsa kommunu – hildin ein borgarafundur á Húsum, har møguleiki var at seta borgarstjóranum og varaborgarstjóranum í Klaksvík og umsitingini spurningar. Eisini hevur Húsa kommuna skipað fyri egnum borgarafundi, har málið er lýst væl og virðiliga.

Húsa kommuna hevur havt fund um samanleggingarsáttmálan, og hevur bygdarráðið einmælt samtykt at taka undir við hesum.

Sáttmálin ber við sær, at samanleggingin verður gjøgnumførd 1. januar 2017, eftir at eitt nýtt býráð hevur tikið við. Eins og gjørt hevur verið áður, so fara kommunurnar at arbeiða tætt saman, og á allan hátt at samstarva sum ein kommuna frá tí degi, sáttmálararnir eru undirskrivaðir.

Við í tilgongdini hevur umsitingin eisini sparrað við Heilsu- og Innlendismálaráðið, ið nú umsitur kommunumál.

Skriv er eisini komið frá borgarunum á Syðradali við ynski um, at ein staðbundin nevnd verður fyri Syðradal og ein fyri Húsar.

Eftir drúgva tilgongd er málið nú klárt at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí fylgiskjal 2.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at taka undir við uppskotinum um samanleggingarsáttmála við Húsa kommunu.

**FíN 26-01-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-01-2016, og mælir til, at staðbundin nevnd eisini verður sett á stovn fyri Syðradal.

**Býráðsins samtykt 28-01-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 26-01-2016.

## 3/16
## 15/01202 Víðkan av leigumáli í KÍ-hølini - á Skúlatrød

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.01.2016 | 3/16 | |
| 2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 19.01.2016 | 2/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.01.2016 | 4/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.01.2016 | 3/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Á Skúlatrød hevur tørv á fýra flokshølum í KÍ-høllini komandi skúlaár. Í hesum sambandi hevur skúlastjórin á Skúlatrød vent sær til trivnaðardeildina við fyrispurningi um møguleikan at fáa enn eitt flokshøli í KÍ-høllini. Orsøkin til tað er, at hetta gevur møguleika at hýsa antin øllum 8. ella øllum 9. flokkunum í KÍ-høllini, meðan skúlabyggingin fer fram. Tað verða fýra 8. flokkar og fýra 9. flokkar, og í løtuni eru trý flokshølir í KÍ-høllini.
Hølið í KÍ-høllini, sum er møguligt at gera um til flokshøli, liggur beint við ta norðaru inngongdina á eystaru síðu.

Trivnaðardeildin hevur vent sær til vinnu- og mentanardeildina, ið umsitur KÍ-høllina fyri at kanna, um hetta letur seg gera. Sambært vinnu- og mentanarstjóranum kann hølið í KÍ-høllini, sum í dag hýsir pørtum av umsitingarvirkseminum hjá KÍ, verða tøkt til skúlastovu í vár. Til ber at skipa virksemið í høllini, so virksemið hjá KÍ flytur úr hølunum ikki seinni enn 1. mai; sostatt kemur henda møguliga broyting ikki at nerva virksemið hjá KÍ.

Í samband við sýn av hølinum, sum eftir ætlan skal verða enn eitt flokshøli í KÍ-høllini, metir tekniska umsiting, at hølið kann nýtast av 22 næmingum. Og tekniska umsiting kann taka sær av at standa fyri arbeiðinum at dagføra hølið til ætlaðu nýtsluna.

**Lógargrundarlag:**

§§ 47, 52 og 57 í Fólkaskúlalógini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tekniska umsiting hevur verið og sýnað hølið og fingið tilboð upp á niðanfyristandandi arbeiðir:

3 bjargingar-op (vindeygapartí skiftast)
Veggur dagførast brunaliga
Ábøtur á loftið
El-arbeiði og ljósamatur + ventilatión
Veggir málast
Ymiskt ókent

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður málið við hesum lagt fyri nevndir og býráð til umrøðu og støðutakan við tilmæli um, at eitt fjórða høli í KÍ-høllini verður innrættað til flokshøli, og at arbeiðið verður fíggjað við flytingum millum kontur, frá rakstrarstaðnum "Skúlabarnaflutningur" til "Ítróttarøkið, íløga".

**MeN 18-01-2016**
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen og Óluva Klettskarð, tekur undir við tilmæli frá umsitingini, 13.01.2016.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Atli S. Justiniussen, tekur ikki undir við, at peningurin verður fluttur frá "Skúlabarnaflutningur" til "Ítróttarøkið, íløga", men verður heldur mælt til at taka av "Skúlaøkinum" til endamálið.

**TrN B&U 19-01-2016**
Ein meiriluti, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen og Herfrí Sørensen, tekur undir við tilmæli frá umsitingini, 13.01.2016.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur ikki undir við, at peningurin verður fluttur frá "Skúlabarnaflutningur" til "Ítróttarøkið, íløga", men verður heldur mælt til at taka av "Skúlaøkinum" til endamálið.

**FíN 26-01-2016**
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Signhild V. Johannesen og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutanum í MeN 18-01-2016 og meirilutanum í TrN B&U 19-01-2016.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur undir við minnilutanum í MeN 18-01-2016 og minnilutanum í TrN B&U 19-01-2016.

**Býráðsins samtykt 28-01-2016**
Málið tikið av skrá. Verður lagt fyri Teknisku Nevnd og Býráðið í februar umfarinum.

**FRAMMANFYRI NEVNDU MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**